# Sólin fýra vikur hægri



*21. januar. Nú bakar sólin klárar dagar so nógv niðri í bygdini í Oyndarfirði, at hitin rættuliga kennst av henni.*
*Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard*

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

## Tíðin og maktirnar

Tríggjar vikur eru millum hesar myndirnar. Onnur, tann við stóra skuggunum á fjallinum, er tikin styttsta dag av Hellunum og heim til Oyndarfjarðar. Tað er fjallið sum vísur okkum hvussu sólin ferðast eftir himinum, so næstan ótaldar nógvar kilometrar burtur. Og aðrastaðni í landinum eru tað onnur fjøll, sum siga fólki frá hvussu nógv dagurin er longdur, hvussu nógv ljósari tað longu er blivið síðan styttsta dag beint undar jólum.

Onnur er tikin styttsta dag og hin er tikin 23 dagar seinni og munurin er stórur. Styttsta dag eru tað bara tvey hús í Oyndarfirði, har sólin skínir beinleiðis á. Tað er á Marknagili og í Garðshorni, nú eru tað longu fleiri, ja er klárt um hesa tíðina, so fáa øll húsini í gomlu bygdini at síggja Várharra'sa sól, sum skínur yvir høgum og lágum.

Sólin lumpar eitt sindur. Gamalt er í Oyndarfirði, at antin á nýggjárinum ella á Trettandu skal sólin aftur skína á kirkjutornið. Tað hevur ikki heilt við vissu eydnast at fingið hetta staðfest eftir minninum hjá eldri oyndfirðingum. Á nýggjárinum og á Trettandu sást ikki farvegurin av nakrari sól í Oyndarfirði í ár. Tað var illveður báðar dagarnar.

Oyndfirðingar eru eisini umskiltir um teir ikki heilt við vissu duga at siga frá sólini ávísar dagar, tí ofta er hon slett ikki at síggja og annars í allari almindiligheit hava teir annað at gera enn at ganga og hyggja eftir sólini.

Sólin lumpar eitt sindur, tí nú tann 14. januar á middegi, tá hon er hægst á himmalinum, so skuldi hon lýst kirkjutornið í Oyndarfirði og húsini har kring. Í hvussu er, um tú stendur á Hellunum og hyggur heim og har sær tú alt. Tað ger hon ikki, kirkjutornið er grønt, sum undan penslinum, og har skyggir einki. Og hyggur tú fram á Helvtina, sum tú ikki sær úr Oyndarfirði ella av Hellunum, men sum tú so víst sum Amen í kirkjuni veit er har, so fær tú forkláringina.

Tað hongur soleiðis saman, at alt sólarljós, sum skal røkka norður til Oyndarfjarðar hesa tíðina av árinum má koma um Helvtina á heilt jøvnum føti við alla aðra ferðslu í landinum. Sólarljósið ferðast við rúkandi ferð heim eftir Helvtini, ótarnað av svarthálku, gleri og krapa. Alt sólarljós til Oyndarfjarðar má koma gjøgnum hesa smogu. Og prógvið síggja vit uppi fjalli har høgru megin stendur skuggin av Jarðardalstindi meitlaður svartur inn í gula og morreyða hagan. Vinstru megin er tað Knúkur, sum speglast aftur sum fjallaskuggi uppi í fjalli. Ókenniligur, men tað er hann, tað vita vit staðkendu.

Sólin lumpar eitt sindur, tí mær er fortalt, at tá hon er hægst á himni á middegi, tá hon stendur í suðri, so skal hon lýsa á kirkjutornið og tað ger hon barasta ikki í dag. Taka mínir bygdafelagar feil. Minnast teir skeivt, ella er tað bara møsn. Tað er myrkt heimi í bygdini, dagsljós, men einki eldhav í glinsiniborgunum skyggir út til mín á Hellunum.

So hendur undrið. Jørðin snarar við alsamari ferð eitt sindur meira eysturá um seg sjálvan, sum hon plagar og sólin flytist longur vestur á himinin og nú henda broytingar upp í fjalli. Fjallaskuggin lækkar, flatnar næstan út og tann annars so mektigi Jarðardalstindur er ikki annað enn ein pirra í skuggalíki omanfyri Miðhamar. Og sólin fer at skína niðri í bygdini á grøna tornið, har klokkan sunnudagar og heilagt kallar sálir allar heima til hallar. Og tornið lýsnar og grøni liturin gerst heitur í hesum stutta fløva uttan úr alheiminum frá okkara lívgevandi sól millum ævinleikan og okkum. Og trúgva eldkúlan minnir okkum støðugt á hvussu lítil vit eru í Guds skapannarverki.

Oyndarfjørður hevur fingið sólina aftur, hesuferð dokumenterað við einum Nikon Coolpix 5700 myndatóli og einum nostalgiskum skribenti, parkeraðum á Hellunum. Og hon er komin aftur mong tíggjutals túsund ár undan hesum, stillisliga, uttan hóvasták og skriving. Hon fer at halda á fram at koma aftur fram til tann eina dag, tá stjørnurnar fara at detta niður av himmalinum og alt upploysist í eldi og roki og vilja tit vita meira um hetta so kunnu tit fara í Opinberingina og evangeliini, tað er spennandi og øgisligur lesnaður til áminning, uppbygging og forskrekkilsi.

Eg skal ikki plága tykkum meira við fjallaskuggunum í fjallinum í Oyndarfirði, tí um nakrar fáar dagar er sólin komin so høgt, at skuggin er burtur og tá er ikki meira at skriva um hetta evnið ikki fyrr enn aftur í heyst um mánaðarskiftið november/-desember, tá alt endurtekur seg aftur, bara í øvugtari rekkjufylgju.

Meðan sólin dvølist niðri í heimbygdini, standi eg í skugganum úti á Hellum, her er myrkt sum í Depli á vetri, sera ringur sólargangur og eg hugsi hvussu nógv mín heimbygd er broytt seinastu 150 árini, meðan Hellurnar hava verið bygd í Føroyum. Tá undamaður mín í fyrstbygdu niðursetuhúsunum á Hellunum, lambamaðurin Janus Jensen settist niður her í 1849 var Tartur einasta hús í Oyndarfirði innanfyri Stórá. Hygg í dag, nú er kapping um at leggja bøin undir norsk og donsk typuhús og við hesi gongd , so er bygt niðan til garðarnar um stutta tíð. Vakri bøurin verður eirindaleyst og uttan fyrilit tikin til húsabygging. Og hetta ættarliðið er ikki verri enn undanfarin. Skrúvi bara tíðina 150 ár aftur, so fáa tit sjón fyri søgn. Av húsum tá standa bara Dungin og kirkjan eftir, alt hitt er nýtt. Men um tað er gott ella ringt ferð tíðina at døma um. Oyndarfjørður hevur verið fyri broytingum fyrr, hann hevur fleiri ferðir, allur sum hann er, verið undir ísi upp til fjallatopparnar, á sama hátt sum vit síggja í Grønlandi og á Svalbard í dag. Sár frá gravkúm og útlendsk sniðgivnum húsum fer hann eisini at tola. Tað er nokk bara evsti dagur, sum kann hótta hesa fjálgu vøggu.



*21 dagar eftir styttsta dag er skýggin lækkaður munandi upp í fjalli í Oyndarfirði, myrkrið er av á hesum sinni.*
*Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard*



*Várharra er pírin við sólarljósið til oyndfirðingar styttsta dag undan jólum. Myndin er tikin tann 21 desember í fjør sum var ein tann styttsti dagurin í árinum.*
*Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard*

## Epilogur, endatala

At leita eftir sól í Oyndarfirði hesa árins tíðina er ikki bara sum at siga tað, men meðan hendan greinin bíðaði eftir at koma í blaðið, komu vit fram til 21. januar. Tá sá sólin í Oyndarfirði, ein máni er liðin síðan styttstadag og myndin sínir hvussu sólin flytir seg á himmalinum. Myndin er tikin á middegi, tá sólin stendur í suðri og er hægst á himmalinum. Nú er ongin ivi, bygdin, tann gamla, liggur baðað í sólarljósi, fjallaskuggin er næstan horvin, og lív er aftur komið í sovandi kykt og linan vøkstur. Og ein eygleiðing kom av hesum trimum myndunum. Tey innastu húsini í bygdini, tey sum eru til vinstru í myndini, tað eru tey sum eru nærmast sólini, men tað eru tey sum síggja hana seinast.

Nú kunnu tit kanska spyrja enn einaferð, hví skrivi eg alt hetta um sólina. Ella sum eg hoyrdu nú ein dagin í Oyndarfirði, tá eg prátaði við ein mann um hvussu langt sólin var komin. Hann risti við høvdinum, beit meg av stutt og greitt og óimponeraður og segði: Og hvat so, men nakað heilt annað, hvat heldur tú um valið?

Men gitni filmsleikstjórin Steven Speelberg kemur kanska nærri svarinum um hesa skriving í filminum um báðar littu systrarnar í suðurstatinum, har niðarfyristandandi brotið er tikið úr:

"I think it pisses God off, if you're walking by the colour purple in a field and you don't notice it (From 'The Colour Purple')"

"Eg haldi Gud gerst rættuliga súrur og særdur, um gongur í eini blómuskrýddari ong og ikki varnast tað." Leysliga týtt.

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 341800, telefax 341801,
teldupostur: post@sosialurin.fo